# Nógv herverk um vikuskiftið

**Vakthavandi á politistøðini í Havn sigur, at tað hevur verið nógv herverk í Havnini hetta vikuskiftið. Men tað hava ikki bert verið herverk, sum eru vorðin fráboðaði hetta vikuskiftið**

HERVERK
*Solby A.Eliasen*

Leygarkvøldið var dansur í Badmintonhøllini, og vakthavandi á poltitistøðini sigur, at tað vísir seg at verða meir at gera hjá løgregluni tá.

Um tvey-tíðina náttina til sunnuagin breyt ein 14 ára gamal drongur inn í eini sethús við Varðagøtu og stjól ein bógv. Løgreglan fekk fatur á dronginum.

Eisini var eitt innbrot í kjallarin í sjálvari Badmintonhøllini, men ikki er greitt enn, um nakað varð stolið.

Nakað seinni um trýtíðina fekk løgreglan boð um ein bardaga í býnum. Tað vóru tveir mans, sum vóru farnir at berjast um eitt konufólk. Tann eini av teimum varð handtikin og verður skuldsettur fyri harðskap.

Vakthavandi sigur, at tað sá álvarsligt út, men veit ikki at siga, hvussu støðan hjá tí eina manninum er nú. Leygarmorgunin sást ein neyðrakett yvir Argjalandinum. Løgreglan boðaði Vaktar og Bjargingartænastuni frá og kannaði eisini málið sjálv. Men har var onki at síggja, so gitt verður, at rakettin bleiv send frá landi av.

Vakthavandi greiddi eisini frá einum afturvendandi trupulleika. Og tað eru allir hundarnir, sum ganga leysir úti í Nólsoy. Vakthavandi sigur, at løgreglan hevur verið har úti, og so er í lagi ein tíð, men so byrjar tað aftur.

Hetta er ein aftur vendandi trupulleiki, sigur vakthavandi á Politistøðini í Havn.





















# Kavin kom í morgun

**Flaggdagin var veðrið avbera gott og nógv fólk leitaðu sær út til flaggdagshald. Og gott tað sama. Tí Dýra Biðidag var ikki útfarandi fyri kavaroki og vindi**

LAMBASPRÆNIN
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Fólk vildu illa trúgva sínum egnu eygum, tá tey Dýrabiðidag vóru vitni til at fold okkara enn einaferð í ár bleiv kavaklødd. Í rættiligum illveðrið legðist kavin um alt landið Dýra Biðidag. Tað var rættiliga kalt og tað líktist eina løtu klakaveðrið. Kavin, sum var óvanliga drúgvur fyrr í vár, kom enn einaferð aftur. Og kuldin merktist sera væl. Og onkur var skjótur at taka til at hetta óivað er lambasprænin, sum herjar Føroya land.

Nógvur vindur var eisini henda dagin, og bátarnir, sum dagliga, í hesum verkfalsdøgum, sigla fólk yvir um Leirvíksfjørð, sigldu ikki nógvar túrar henda dagin, orsakað av veðrinum.

Sosialurin tók nakrar myndir av kavanum Dýra Biðidag.


*Tað byrjaði at kava um morgunin Dýra biðidag og longu tíðliga út á seinnapartin var avkavað í Klaksvík*


*Hetta kundi verið ein mynd á einum jólakorti, men er hetta heldur eitt træ, sum mátti boyggja sínar greinar fyri tí nógva og tunga kavanum Dýra biðidag 2002*

# Oljuleki í Kollafirði

**Nógv olja er likin út á sjógv í Kollafirði. Og løgreglan væntar, at talan er um ein leka frá landi av**

DÁLKING
*Solby A. Eliasen*

**Kollafjørður:** Fólk varnaðust oljuna fyrstu ferð Flaggdagin. Menn frá Brandstøðini fóru á staðið og løgdu sperrir út. Men leygardagin varnaðust fólk aftur, at meiri olja var komin á sjógvin. Men hon var ikki komin út um sperrurnar. Tískil verður gitt, at oljan lekur onkrastaðni frá landi av.

# Stjól tríggjar bilar

**Leygarnáttina stjól ein 16 ára gamal drongur ikki minni enn tríggjar bilar og rendi út av við tveimum av teimum**

STULDUR
*Solby A. Eliasen*

Drongurin, sum var fullur, rendi fyrst út av í Kollafirði. Síðani stjól hann ein annan bil har og koyrdi til Havnar og rendi so aftur út av har. So tók hann enn ein bil, men sum hann, aftan á at hava koyrt ein biltúr setti upp á pláss aftur í heilum líki.

Løgreglan kannaði málið og fann fram til drongin, sum tá var farin til hús.

Hann verður nú skuldsettur fyri stuldur og rúsdrekkakoyring við ongum koyrikorti.

# Innbrot í matstovu í Saltangará

**Náttina til sunnudagin var eitt innbrot í John´s Restaurant í Saltangará. Vakthavandi á politistøðini í Runavík sigur, at annars hevur vikuskiftið verið sera friðarligt í Eysturoynni**

INNBROT
*Solby A. Eliasen*

**Runavík:** Fólk varnaðust ikki innbrotið fyrr enn sunnumorgunin. Men gerningsmaðurin hevði tikið ein rút úr bakhurðini og var sloppin inn tann vegin. Hann hevði stolið rúsdrekka og øl, sigur vakthavandi.

Annars hava tað verið fleiri smávegis ferðsluóhapp í Eysturoynni orsakað av kavanum, sum so brádliga legðist um alt landið Dýra Biðidag. Vakthavandi sigur, at fólk hava ikki væntað kava aftur og tí hava tey tikið píkadekkini av bilunum.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

